# Er døgg á rútinum?

## DØGG INNI

Tað er ein vanligur trupulleiki, at døgg legst á innaru síðuna á glasinum í vindeygum. Døgg kemur á rútin, tá heit slavin inniluft rakar eina kaldari glasflatu. Tá tann heita luftin við hægri vætuinnihaldi kemur í samband við kaldar flatur sum t.d. ein rút, verður luftin køld niður, og vætan í heitu luftini skilir seg út, og legst á tí køldu flatuna. Orsøkin til at hetta hendir, er tann, at køld luft, sum er næst rútinum, ikki klárar at bera eins nógva vætu, sum heitari luft klárar.



Døgg sæst ofta undir skiftandi veðri t.d. um várið og heystið, tá tað er stilli, klárt og kuldi er í veðrinum. Døgg kann eisini koma á rútarnar á nýggjum vindeygum í eldri húsum. Hetta vegna tað at húsini gerast nógv tættari av bjálving og tetting. Eini væl bjálvað hús, sum ikki hava góða útlufting, eru í størri vanda fyri at fáa døgg á vindeyguni innan.

Luftar tú ikki nóg væl og ofta út, og sleppur døggin og vætan at liggja í vindeygunum, er stórur vandi fyri at gróður legst á pakningin innan. Hetta fremur ikki eina góða inniluft, og sær ikki pent út. Er gróður komin í, kann hann vaskast vekk t.d. við Rodalon.

---

*Bestu ráðini eru at lufta væl og regluliga út.*
*Hevur tú ikki eina sjálvvirkandi útlufting, mugu vindeyguni latast upp hvønn dag.*
*Skilagott er at turka døggina vekk hvønn morgun.*

---

## DØGG ÚTI

Tað kann koma fyri við nýggju 3-lagaðu lágorkurútunum, at døgg leggur seg uttan á rútinum. Hetta hendir serliga tá ráligt er í luftini og hitin skiftir, t.d. við sólsetur og sólarris. Tað, sum hendir t.d. á morgni, er at uttasta lagið á rútinum er kalt eins og náttarluftin. Tá sólin rísir, hitnar luftin skjótari enn uttasta lagið av rútaglasinum. Hetta ger, at heita luftin sleppur vætuni á tað kalda glasið í rútinum, og sæst aftur sum døgg. Hetta fyribrigdi er oftast á húsasíðuni, sum vendir suðureftir og sólin tískil fyrst kemur á. Hóast hetta kanska sær nakað óheppið út, so er hetta eitt gott tekin. Hetta prógvar at vindeyga bjálvar væl og heldur tí heitu luftini inni.

Vil man gera eitt átak at fyribyrgja døggini, so siga glasframleiðarar, at tað kann gera ein mun, um man av og á vaska rútarnar við bilrútavask, turkar væl aftaná og smyr evnið á. Hetta evnið hevur ymisk heiti ClearVue, RainClear, RainX o.s.fr. og fæst til keyps m.a. á bensinstøðum. Eftir hesa viðgerðina gerst rúturin so mikið hálur, at døggin ikki hongur á rútinum, men rennur beint av.

---

Á donsku síðuni hjá Bolius er meira at lesa um døgg. Videncentret Bolius er óheftur vitanarstovnur stuðlaður av grunninum Realdania. Leinkið er her: https://www.bolius.dk/dug-og-kondens-paa-vinduer-18356